# Hoydal og Helmsdal




**Hesa vikuna komu tvær upprunað føroyskar bøkur út. Onnur er stórfingna lyklaskaldsøgan, *Í havsins hjarta*, hjá Gunnari Hoydal, og hin er spennandi barnaskaldsøgan, *Gott hugflog, Hugo*, hjá Rakel Helmsdal. Sosialurin hevur hitt tey bæði til prát um tað at skriva í Føroyum, um góðan skaldskap og tað ikki at vera sæddur ella hoyrdur.**

SKALDSKAPUR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Gunnar Hoydal gav í gjár út skaldsøgu sína, *Í Havsins Hjarta*. Bókin er eitt stórverk á 500 síður, sum við støði í persónligu søguni hjá rithøvundanum letur føroyska samfelagið í 20. øld í ein skaldligan ham. Trý ættarlið ferðast til og frá lítla oyggjalandinum mitt í havinum, sum fer ígjøgnum stórar búskaparligar, hugsjónarligar og mentanarligar rembingar.

Hesa vikuna kom eisini ein upprunað føroysk barnaskaldsøga út, hetta er *Gott Hugflog, Hugo* eftir Rakel Helmsdal. Søgan um Hugo liggur fjart frá sosialrealistisku og samfelagsligu skaldsøguni hjá Gunnari Hoydal. Í býnum Port Janua enda hugríki Hugo og vinir hansara í einari spennandi søgu, sum vísir seg at hava rótfesti í einum meira ráum og samansettum veruleika enn eitt vanligt barn kann ímynda sær.

Bæði sum menniskju og rithøvundar eru Gunnar Hoydal og Rakel Helmsdal sera ymisk. Men tey brenna bæði fyri tí góða skaldskapinum, og tey hava bæði eitt serligt útsýni og opinleika, sum kanska kemur av, at tey bæði eru hálvt um hálvt føroysk og donsk, og tey bæði hava búð í heilt øðrum mentanum.

### Skrivandi ættin

Nógv kundi verið at trivið í burtur úr skaldsøguni hjá Gunnari Hoydal. Vit kundu tosa um føroyska málstríð, fólkaatkvøðuna í 1948, reiðarar sum útflyta vánaligan fisk, útisetalív í Keypmannahavn, býarstýri í Havn og vinnulívsmenn sum gera sær dælt at kreppu.

Men inni í hugnaligu stovuni við klassiskum donskum møblum og ráari føroyskari list lata vit øll hesi áhugaverdu mál liggja og velja heldur at práta við stilla, men bersøgna rithøvundin um tað at vera rithøvundur.

- Tað hevur altíð verið nógv skriving í familjuni, og tað at lesa og skriva eru altíð verið nakað sjálvsagt, sigur Gunnar Hoydal

Nýggja skaldsøgan er full av forteljandi og skrivandi fólki. Vit hava gomlu konuna, sum fortelur søgur í roykstovuni, og konsulin, sum altíð fortelur somu søgur á ballum í Havn. Langabbin, presturin Jørgen, skrivar fittar søgur um bygdafólk í Sandi, skyldmaður fylgir í somu sporum og skrivar ósannar søgur um fremmand fólkasløg. Og tann góði skaldskapurin er umboðaður av pápanum og øðrum føroyskum rithøvundum sum Janus Djurhuus og William Heinesen, og útlendskum stórskaldum sum Ernest Hemmingway og Pablo Neruda.

### Byrjaði tíðliga

Sjálvur byrjaði Gunnar Hoydal at gera nakað við skrivingina, tá hann sum ungur drongur gekk á kostskúla í Sorø Akademi, har fleiri føroyskir rithøvundar høvdu gingið, millum annað Jørgen Frantz Jacobsen.

- Meðan eg gekk har, komu brøvini hjá Jørgen Frantz Jacobsen út, og eg var sera hugtikin av hansara skriving, greiðir Gunnar Hoydal frá.

- Hann fortaldi um nakað sum eg kendi til, bæði tað lokala og tað heimsopnað, og hann var eisini hálvt um hálvt føroyingur og dani sum eg sjálvur og dugdi at greiða frá tí føroyska út frá einum øðrvísi sjónarhornið, sigur Gunnar Hoydal.

Rakel Helmsdal var eisini ung, tá hon hugsaði um seg sjálvan sum rithøvund fyrstu ferð. Sosialurin hevur eisini vitjað hana í samband við nýggju bókaútgávuna. Og inni í hugnaligu og farvuríka køkinum við føroyskt gjørdum møblum, merkist bæði barnsliga hugflogið og breittfevnandi persónmenskan.

- Eg havi altíð fortalt søgur, og longu sum 12-13 ára gomul visti eg, at eg vildi vera rithøvundur. Sum lítil fann eg altíð upp á søgur, og tá eg fekk høvi at skriva frístíl í skúlanum, elskaði eg at fara í holt við onkra spennandi søgu, sigur hon.

### Ikki lønandi starv at skriva

Men hóast hon ætlaði sær at vera rithøvundur, so væntaði Rakel Helmsdal ikki at kunna liva av tí.

- Mamma var yrkjari, tað var hennara samleiki, men hon arbeiddi sum læknaskrivari. Rakel Helmsdal hevur í dag tann framíhjárætt, at hon hevur fingið eina trý ára starvsløn frá Mentanargrunni Landsins. Men hon arbeiðir eisini kvartað tíð á Jarðfeingi.

- Eg elski at skriva, tað er tað eg dugi best, og har føli eg at eg kann gera mun. Men eg haldi álíkavæl fast í eitt gott og trygt vanligt arbeiði.

Gunnar Hoydal valdi sær lívsstarv uttan fyri skaldskapin, um tó ikki heilt uttanfyri listina. Hann var fyrsti býararkitektur í Føroyum, tá hann í 1960unum flutti heim til starv í Tórshavnar kommunu.

Byggilistin kom av áhuga, men eisini tí hann visti, at tað bar ikki til at liva av skaldskapi.

- Tað var óhugsandi bara at liva av skaldskapi, sigur Gunnar Hoydal

Pápin, Karsten Hoydal var ein slóbrótari innan føroyskan skaldskap við sínum fríu, órímaðu yrkingum. Men hann var eisini landbúnaðarfrøðingur og hevði nógv álitisstørv í Føroyum og uttanlands.

### Listin í søguni

Góður skaldskapur er, sambært Gunnari Hoydal, annað og meir enn bara ein frágreiðing.

- Har má vera ein kjarna, sum ber út um einstøku søgurnar. Tá tú lesur stórar rithøvundar leggur tú merki til, at tað er ein serlig kensla ella ein serlig rødd, sum gjøgnumsúrgar alt.

Hjá teimum best gávaðu kemur hendan røddin møguliga av sær sjálvum, men ofta er hon ald fram við nógvari skriving, heldur Gunnar Hoydal.

- At vera rithøvundur er eitt djúpt álvarsamt arbeiði, tí tú mást gera alt fyr at tað skal sita væl og samstundis lyfta seg upp um smáu søgurnar, sigur hann og greiðir frá um pápa sín,